

# Íslendingar hava fingið burturav Eivør

**Eivør Pálsdóttir er ikki longur ein ókendur songfuglur, sum føroyingar hava heilt fyri seg sjálvan. Íslendingar hava fingið burturav henni, og hava tikið hana til sín sum eina av teirra egnu. Tað var týðuligt undir og eftir útgávukonsertina hjá Eivør í íslendsku operuni týskvøldið**

*Mynd: Sigurjón Guðjónsson*

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*
*runar@sosialurin.fo*

**Reykjavík:** Dagarnir tá Eivør Pálsdóttir var ein væl varðveittur føroyskur loynidómur eru taldir. Í Íslandi er hon nú so væl umtókt, at handlarnir í Reykjavík tømdust mest sum beinanvegin fyri fyrstu sending av nýggju fløgu hennara "Krákan". Og á útgávukonsertini týskvøldið vildi standandi fagnaðurin frá nærum fullsettu áhoyraraplássunum ongan enda fáa.

Men hóast hon tosar og syngur íslenskt sum ein innfødd, hevur Eivør varðveitt alt, sum er føroyskt við henni, og hevur ikki latið seg í nakran íslendskan ham.

Og tað er júst hetta, ið íslendingar tykjast at dáma við føroysku songkvinnuni. Á útgávukonsertina vóru hundraðtals fólk komin at hoyra Eivør tulka føroysk skjaldur og syngja sínar egnu, føroysku, sangir. At tey ikki skiltu orðini, legði eftir øllum at døma eingin nakað í, tí sum fleiri søgdu aftaná konsertina, so skiltu tey altíð huglagið í tekstinum, sum Eivør sang.

## Funnið sín egna stíl

Tað eru liðin fýra á síðan tann tá 16 ára gamla Eivør gav sína fyrstu fløgu út, eina fløgu sum av góðum grundum enn verður spæld og sum eisini hevur selt rættiliga væl í Íslandi, so hvørt sum songkvinnan er vorðin alt meira kend.

Við nýggju fløguni, "Krákan", tykist Eivør at hava funnið sín egna stíl. Hennara fortíð í jazzi fornoktar seg ikki, og tað ger tíðin sum progressivur rockari bestemt heldur ikki. Sjálv framførslan av løgunum er tann berandi kraftin heldur enn løgini sjálv ella teksturin, og tað er kanska orsøkin til at Eivør sleppur væl frá at syngja á føroyskum.

Íslendingar trúgva í hvussu er uppá, at tað eisini er ein framtíð fyri føroysku songkvinnuna uttan fyri Ísland.

- Eg eri sannførdur um at Eivør fer at koma langt. Hon hevur alt, sum skal til, fyri at gerast kend um allan heimin. Og tá hon verður tað, vænti eg at vit íslendingar fara at vera stoltir av henni, tí vit kenna at vit eiga eitt sindur í henni, hóast hon er føroysk og syngur á føroyskum, segði blaðstjórin á tónleikablaðnum "Sánd", eftir at hava hoyrt Eivør enn einaferð.

## Til Japan

Aftaná konsertina var sokallað release-party á einum náttklubba í íslendska høvuðsstaðnum, har umboð fyri fjølmiðlar og onnur innboðin savnaðust.

Vikurnar undan útgávuni hevur Eivør verið ein tann mest umtalaði persónurin í íslendskum fjølmiðlum, og áhugin fylgdi føroysku songkvinnuni heilt upp á pallin týskvøldið, har íslendskt sjónvarp tók upp undir ljóðroyndini fyri at senda beint undan konsertini.

At fylgja sær tónlistarliga hevur Eivør seinasta árið havt tríggjar av frægastu íslendsku tónleikarunum av sínum slag. Petur Grétarsson, ið spælir trummur, percussion og harmoniku á fløguni, fekk eina telefonuppringing frá Eivør.

Eivør sigur, at hon hevði hoyrt, at Petur Grétarsson var tann frægasti trummuspælarin í Íslandi og tí ringdi hon til hansara, tá hon skuldi savna sær ein bólk. Afturat sær fekk Petur Eðvarð Lárusson, guitar, og Birgir Bragason, bass, og hesir hava allir fylgt Eivør hetta seinasta árið.

Í fyrstu atløgu verður fløgan hjá teimum trimum og Eivør givin út í Íslandi og Føroyum. Fyrst í komandi ári fara tey hennara á konsertferð í Norðurlondum við fløguni og so er ætlanin at royna fjarari marknaðir, eitt nú eru ítøkiligar ætlanir um at fara til Japan.

**Eivør og bólkur hennara hava føroyska útgávukonsert í Norðurlandahúsinum 23. november.**

# Eivør skal syngja á føroyskum

**- Eivør er meira enn bara ein góður sangari. Hon er eitt heilstoypt listafólk, og tí skal hon koma sær fram á sín egna hátt og syngja hennara egna tónleik, tónleik úr Føroyum, heldur Lárus Jóhannesson frá 12 Tónum, sum geva útfløguna "Krákan"**

TÓNLEIKUR
*Rúnar Reistrup*
*runar@sosialurin.fo*

**Reykjavík:** Hendan týsdagin hevur Lárus Jóhannesson hongt appelsinlitaða slipsið um hálsin, uttan at knýta tað í ein slipsaknút. Tað hevur longu verið ein harður dagur, tá vit hitta hann á málið um eitt-tíðina, beint eftir at ein take-away døgurði í skundi er fingin niðurum. Og fram til klokkan 21, tá útgávukonsertin hjá Eivør Pálsdóttir er sett at byrja, er nógv sum skal fáast frá hondum. Ov nógv til at tíð er til at renna heim eftir slipsinum og ov nógv til at tað loysir seg at binda hendan sveittaframkallandi klútin um hálsin longu nú.

Lárus er nýklaktur fløguútgevari. Seinastu seks árini hevur hann fyrireikað seg og sítt felag, 12 Tónar, ið hann eigur saman við Jóannes Ágústssyni, til hesa hending.

- Felagið varð stovnað fyri seks árum síðan millum annað við tí endamáli at útgeva tónleik, men kortini er hetta tann fyrsta fløgan, vit útgeva.

Orsøkin til at fyrsta fløguútgávan hevur bíðað so leingi er, at Lárus og Jóannes vildu hava góða tíð at seta seg inn í tónleikavinnuna, bæði í Íslandi og uttanlands, áðrenn teir kastaðu seg út í sína egnu útgávu. Hesi seks árini, síðan felagið byrjaði, hevur 12 Tónar rikið ein plátuhandil í Reykjavík.

Fyrsta útgávan hjá 12 Tónum kallast "Krákan" og aftanfyri hana stendur navnframa føroyska sangarinnan Eivør Pálsdóttir.

## Nógv tilboð

At kalla øll plátufeløg í Íslandi, harímillum tað størsta, "Skivan", lógu framvið at sleppa at útgeva eina fløgu við Eivør Pálsdóttir. At føroyska songkvinnan valdi júst 12 Tónar er Lárus meira enn fegin um.

- Um eg í dag kundi valt millum allar heimsins fløgur, hevði eg valt hesa sum fyrstu útgávu hjá felagnum. Eg vil hava allan heimin at vita um Eivør.

Um orsøkina til at tað bleiv lítla 12 Tónar, sum ongantíð hevur givið eina fløgu út fyrr, heldur enn okkurt størri og kendari plátufelag, sum fekk avtalu í lag við Eivør, kann Lárus mestsum bara gita um.

- Eg kenni nokkso nógv til føroyskan tónleik. Tað er helst ein partur av orsøkini. Eg kenni eisini allar limirnar í bólki hennara, og so kundu vit bjóða Eivør eina avtalu, sum passaði henni væl. Øll plátufeløgini í Íslandi vóru áhugað at útgeva fløguna hjá Eivør, men tað, ið vit sum eitt lítið plátufelag kunnu bjóða framum tey størru, er at vit geva hesari einu útgávuni alla okkara tíð og orku, sigur Lárus.

Onnur plátufeløg høvdu øðrvísi ætlanir við fløguni. Eitt nú setti "Skivan" sum treyt, at øll løgini á fløguni skuldu syngjast á enskum. Hetta vildi Eivør ikki.

- Hetta er ikki nøkur stór fløgumaskina. Vit eru meira sum ein familja og vit hava veruliga virðing fyri Eivør sum tónkleikara, sigur Lárus um felag hansara 12 Tónar.

## Hevur alt, sum skal til

Tað er eingin ivi um at Eivør longu hevur gjørt seg sjálvan til eitt kent navn í øllum Íslandi. Serliga framførslur hennara í íslendskum sjónvarpi hava vunnið songkvinnuni úr Gøtu ans. Men fer hon eisini at taka land á sama hátt uttanfyri brøðratjóðina.

- Eg vóni at hon verður kend um allan heim, og eg trúgvi at hon hevur alt, sum skal til fyri at náa hesum. Hóast Eivør er ung, er hon sera professionel. Hon ansar væl eftir sínum sanggávum, og tá hon arbeiðir við tónleiki, er hon ógvuliga fokuserað. Við hennara gávum og eginleikum kann hon koma heilt langt.

Men at koma langt er einki mál í sær sjálvum, sambært Lárusi, og hann sær hvørki MTV ella aðrar popmiðlar sum ein møguligan veg fyri Eivør.

- Tað er umráðandi at skilja, at Eivør er meira enn bara ein góður sangari. Hon er eitt heilstoypt listafólk, og tí skal hon koma sær fram á sín egna hátt. Eivør skal syngja hennara egna tónleik, tónleik úr Føroyum. At koma sær fram á heimspallinum við hesum slagi av tónleiki er eitt stríð og tað fer at taka sína tíð. Tað finst eingin lættur vegur.

## Má halda seg óspilta

Fleiri íslendskir bólkar royna hendan vegin í løtuni við rímiliga góðum úrslitið. Bólkurin Sigur Rós er longu komin vegin fram, og so er sjálvandi eisini íslendski stoltleikin, Bjørk, eitt dømi. Lárus hevur gjørt sær sínar tankar um hvussu Eivør skal megna at koma óspilt fram.

- Hon verður noydd allatíðina at trúgva uppá seg sjálvan og vera trúgv ímóti sær sjálvari. Allir teir íslendsku bólkarnir, sum hava megnað at koma fram uttanlands, hava megnað tað av tí at teir altíð hava verið júst tað teir vildu vera. Og eg haldi at Eivør hevur teir eginleikar og ta trúgv uppá seg sjálva, sum skal til fyri at koma fram á hendan hátt.

Og her kemur tað føroyska málið inn.

- Eivør er føroysk og hóast hon er stinn í íslendskum, so er hon nógv best, tá hon syngur á føroyskum. Tað at hon syngur á føroyskum ger tað meira krevjandi hjá henni at koma fram aðrastaðni, men í sær sjálvum er tað ikki nøkur forðing. Um tónleikurin er góður er tað líkamikið á hvørjum máli hann verður sungin, sigur Lárus Jóhannesson, áðrenn hann má leypa avstað yvir í operuna, har hann fyrstu ferð skal skipa fyri einari útgávukonsert.



*- Eivør er føroysk og hóast hon er stinn í íslendskum, so er hon nógv best, tá hon syngur á føroyskum, heldur Lárus Jóhannesson frá plátufelagnum 12 Tónum*

*Mynd: Rúnar Reistrup*